# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Eyðun Jacobsen 50 ár



Leygardagin, 14. mai fyllir Eyðun Jacobsen, Glyvrar 50 ár.

Eyðun er føddur og uppvaksin í Klaksvík og er sonur Kristinu og Rasmus Jacobsen. Hann eigur tvey eldri syskin, Ásbjørg og Steinbjørn.

Eftir lokna skúlagongd fór Eyðun í læru sum bygningsmálari og bleiv útlærdur í 1975, tá hann flutti í Eysturoynna at búgva og giftist við Dinnu Nónklett úr Lamba. Tey fingu tríggjar døtrar, Birgit, Kristina og Heidi. Hann eigur 2 abbasynir, Filip næstan 2 ár og Aron 7 mánaðir.

Í 1983 flutti familjan til Danmarkar, og búðu tey har í 17 ár, til tey fluttu heimaftur í 2000. Í Danmark arbeiddi hann fleiri ár nógv við útvarp og ferðaðist nógv um landið við sínum sangi og tónleiki.

Tað sum hevur sermerkt lívið hjá Eyðun, líka síðani hann var ein smádrongur, er sangur og tónleikur. Hann byrjaði tíðliga at klimpra uppá gittarin og var við í ymiskum sokallaðum "kjallaraorkestrum" í Klaksvík.

Hann hevði sín uppvøkstur í brøðrasamkomuni í Klaksvík, og var eisini virkin í sang og tónleikalívinum har.

Hann hevur verið við á fleiri tónleikaútgávum, bæði sum tónleikari, solistur og kórsangari, og er enn ein sera virkin sang- og tónleikari. Hetta hevur eisini smittað av uppá døturnar hjá honum, sum allar eru virknar innan sanglívið.

Í dag er Eyðun sera virkin í sang- og tónleikatænastuni í Kelduni Skálafirði.

Vit ynskja tillukku og Harrans signing.

Føðingardagurin verður hildin fríggjakvøldið 13. mai kl 19.30 í Kelduni, Skálafirði.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsiskan hátt sýndu samkenslu og hálpsemi, tá kæra, elskaða kona, mamma, vermamma, omma, systir og svigarinna okkara

**Hady A. Næs**
f. Vest

doyði og fór til gravar.

Tøkk til Una, prest, og øll tykkum, ið komu í kapelli í Havn.
Tøkk til tykkum, ið tóku ímóti okkum á Drellnesi, og heima við hús um kvøldið, tá ið vit komu suður.
Tøkk til heimahjálparnar, ið vóru so væl um hana, meðan hon lá óhjálpin.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar, gravarar og organist.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávu til Hvalbiar Missiónshús.
Hjartans tøkk til tykkum, sum veittu stóra og avbera góða hjálp við ervinum, og øll tit, ið á ymiskan hátt vóru um okkum.
Tøkk til Ólav, prest, fyri troystarík orð, og tøkk til tykkum øll, ið fylgu konu og mammu okkara til hennara seinasta hvíldarstað, tøkk øll somul.

*Vegna familjuna*
**Manne,**
**Sigrun, Maud, Ingun, Nita og Magnar Haldur**

## Minningarorð um
# Maud Sonju Justinussen
## Streymnes
**24. juni 1972 – 30. januar 2005**



Ja, góða Maud. Nú er eitt sindur fráliðið, síðani tú fór. Saknurin er stórur, og tað tykist so tómt rundan um okkum. Sjálvt um tú var nógv í Danmark, so ringdi tú ofta, og gott var at hoyra málið í tær.

Væl dámdi tær at binda. Tú plagdi at sita við stovuvindeygað og binda, meðan prátið gekk. Vit øll sakna at hoyra málið í tær. Tú var so fyrikomandi og glað. Tú tosaði við øll, tú møtti á vegnum, og av tí sama kendi tú nógv fólk.

Tað eru longu nøkur ár síðani tú kom til Leirvíkar. Tá vistu vit ikki, at tú var sjúk. Tú var so frísk og røsk. Tú greiddi okkum frá, at tú hevði eina hjartasjúku og at tú tók heilivág fyri hana. Um tú ikki hevði sagt okkum um sjúkuna, høvdu vit ikki vitað av, at tú var sjúk, tí tað sást ikki á tær.

Tú gekk í skúla við Áir og tók FHS, har møttust tú og Pauli. Eftir lokna útbúgving fór tú til Havnar á Landsskjalasavnið at arbeiða. Har var tú eina tíð. Síðan fór tú í læru hjá Thomas Dam á Hálsi. Tú bleiv ikki liðug at læra, tí tú gjørdist sjúk. Hetta var eftir, at tit høvdu mist Synnøvu.

Orsakað av sjúku mátti tú halda uppat at læra. Sjúkan gjørdist meira álvarsom, og tú var longri og longri niðri á Ríkissjúkrahúsinum. Tú og Pauli høvdu Hotel Tórshavn sum eitt annað heim. Hóast álvarsama sjúku var tú positiv og glað. Tað var tú, sum royndi at ugga okkum heima í Føroyum.

Tú var á bíðilista at fáa eitt nýtt hjarta. Tú visti alt um sjúkuna og hvat, ið henda skuldi, tá tú skuldi undir skurð at fáa nýtt hjarta. Tú greiddi okkum frá hesum og tóktist ikki vera bangin fyri skurðviðgerðini.

Men so langt kom tú ikki. Tú bleiv so brádliga tikin frá okkum. Høvdu akkurát verið í Streymnesi fyri at ynskja tær og Paula góða ferð niður til Danmarkar. Morgunin eftir blivu vit vakt av telefonini, tað var pápi tín, sum segði, at tú var farin suður á sjúkrahúsið og at illa stóð til. Bert hálvan tíma seinni ringdi Pauli, tá var tú longu farin. Hóast vit vistu, at tú var sjúk, kom tað óvart á okkum. Vit duga ikki at skilja, hví tú skuldi verða tikin frá okkum. Men tað er bert ein, sum ræður yvir deyðanum og honum tørvaði teg.

Tankar okkara leita til tykkum, sum eftir sita: Paula, Jógvan, Stefani, Ólav og Joan, sum hava mist eina góða gentu, dóttur og systur. Harrin má styrkja tykkum í sorg tykkara.

Góða Maud, takk fyri alt.

Vit vilja við hesum lýsa frið yvir minnið um Maud.

**Kristbjørg og Tóra við familju**

*Jóh. 13,7:*
*Jesus svaraði og segði við hann: »Tað, sum eg geri, skilir tú ikki nú; men seinni skalt tú skilja tað«.*

# Teir bygdu Christianskirkjuna



*Myndin er tikin av teimum monnunum, sum vóru við til at byggja Christianskirkjuna í Klaksvík. Kirkjan varð reist hin 11. juli 1962.*
*Veitst tú, hvør er á myndini, so ber til at siga frá um hetta á tlf. 314678.*